# VEÐRIÐ Í NORÐRAGØTU



## MARS 2024

## VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Syðrugøta ........ 3
Veðrið í bygdini ........ 5
Norðan ........ 7
Landnyrðingur norðan ........ 7
Landnyrðingur ........ 7
Landnyrðingur eystan ........ 8
Eystan ........ 8
Landsynningur eystan ........ 8
........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**
Landsynningur ........ 8
Landsynningur sunnan ........ 9
Sunnan ........ 9
Útsynningur sunnan ........ 9
Útsynningur ........ 9
Útsynningur vestan ........ 10
Vestan ........ 10
Útnyrðingur vestan ........ 11
Útnyrðingur ........ 11
Útnyrðingur norðan ........ 12

**Dagfesting**: 29. februar 2024

**Staður**: Brandstøðin í Leirvík

**Heimildarfólk:** Sørin Djurhuus o.fl.

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Norðragøta

Norðragøta er bygd miðskeiðis í Eysturoy – innast í Gøtuvík millum fjøll, onkur av teimum eru høg.

Gøtuvík gongur úr bygdini í landsynning. Úr eystri og upp ímóti norði á norðara armi av Gøtuvík er ein fjallarøð, roknað úr eystri ímóti norði:

- Gøtunestindur (625m)
- Heimaritindur (612m) (*Sigatindur*)
- Knúkur (463m) – á røðini millum Heimaratind og Ritafjall
- Ritafjall (641m)

Á sunnara armi á Gøtuvík eru eisini fjøll – tað nærmasta, Støðlafjall (517m), er umleið 2 km frá Norðragøtu, hini upp í 5 km, so tey ávirka ikki vindin í bygdini stórvegis.

Vestan fyri bygdina og dalin, har Norðragøta er, er eisini ein fjallarøð

- Uttari Tyril Innari Tyril (639m)




<u>Mynd 1:</u> Kort av Eysturoy. Norðragøta sæst í reyða kringinum

# Veðrið í bygdini

Veðrið í Norðragøtu er tengt at ættini, sum tað er í øllum støðum í Føroyum. Langi dalurin niðan úr bygdini og niðan á Varmakeldueiði setur sín dám á veðrið, tá ið ættin liggur oman ígjøgnum dalin.

Ímóti landsynningi er ein tann størsta í víkin landinum, og bygdin liggur opin ímóti havinum. Tá ið ættin liggur heim eftir víkini, er vindurin yvirhøvur javnari, og veðrið ikki so ringt í bygdini í nógvum vindi. Ístaðin fyri er brim í nógvum vindi, og tað kann vera nógvur mjørki viðhvørt.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Norðragøtu, fekk undirritaði samband við Sørin S. Djurhuus (**SSD**), fráfarin tilbúgvingarleiðari. **SSD** fekk samband við 9 úr Norðragøtu, sum vita um veðrið í Norðagøtu.

Teir 9 eru:

- Heri Thomsen, vinnulívsmaður
- Måns Persson, fráfarin kommunuskrivari
- Petur Joensen, bóndi og sjómaður
- Snorri Joensen, radiomekanikkari
- Eliesar Thomsen, sjómaður
- Trygvi Jóhanson, timburmaður
- Sigurd Sørensen, timburmaður
- Andras Hansen, sjómaður
- Ingolf Hansen, sjómaður
- Sørin S. Djurhuus, fráfarin tilbúgvingarleiðari

Við til samrøðuna í hølunum hjá sløkkiliðnum í Leirvík hevði eg spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- ➢ Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- ➢ Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- ➢ Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- ➢ Er hetta mjørkaætt?
- ➢ Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- ➢ Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðurættin er køld og gjøgnumtreingjandi í Norðragøtu – allaræ ttirnar oman ígjøgnum dalin eru keðiligar og kaldar.

Tað er ymiskt, hvussu norðurættin er í bygdini. Tað kann vera stórur munur í veðrinum, verður bert farið stutt. Inni í dalinum er norðan yvirhøvur javnari, men uppi við fjósið kunnu vera hvirlur.

Longri niðri í dalinum er hann ójavnari.

Gamalt er, at kemur norðan á høgum barometri, liggur hann leingi. Verður stilt ímóti kvøldið, er ættin liðug. Er hon eisini keðiig um kvøldið, er hon ikki liðug.

Tað er meira vindur í ættini, enn miðalvindferðin kring landið.

Í Norðragøtu er norðurættin ikki roknað sum vát, men hevur ofta æl við sær. Um summarið er hon roknað sum terraætt. Hoyggingarfólkið fylgdi væl við, tí fór hann í landsnyrðing, so síðkaði hann yvir Ritafjall, og mjørkin kom oman ímóti rókunum. So tornaði hoyggið ikki.

Tað er hvørki mjørki ella brim, tá ið hann er norðan.

Stutt sagt siga tey í Norðagøtu um ættina, at bara tað vinnur oman ígjøgnum dalin, so er ættin ring.

## Landnyrðingur norðan

Nógv tann ringasta ættin í Norðragøtu, serliga har heimi í gomlu bygdini. Tað hoyrist fjalladun úr Ritafjalli, tá ið tað er nógvur vindur.

Í 1888 var illveður av landnyrðingi norði, og so nógvur vindur var, at kirkjan ók av grundini. Í sama illveðri mundi Vaagen gingið burtur á Skarðsvík í Fugloy.

Ættin kann vera so ring í Norðragøtu, at jarðarferðir eru útsettar í nakrar dagar.

Í Norðragøtu verður sagt, at landnyrðingur norðan fer í seg sjálvan – t.e. at hann slær ímóti Tyrli og fer yvir um ánna yvir í bygdina og so úteftir bygdini.

Ein bilur er einaferð sogin upp av parkeringplássinum, vendur øvugt og lagdur á takið á einum øðrum bili, sum stóð við síðuna av.

Ein 17 tons lastbilur varð einaferð tveittur 20 metrar av oman av vegnum, so fluttur niðanaftur á vegin av einari aðrari hvirlu. Tann triðja hvirlan reisti bilin uppaftur, so hann stóð á øllum 4 hjólunum við síðuna av vegnum.

Tað kann ganga ein løta ímillum hvirlurnar – upp í 5 minuttir – men tær eru sera harðar, tá ið tær koma.

## Landnyrðingur

Tá ið hann liggur av landnyrðingi, kemur hann oman av røðini – nakað eystan fyri Ritafjall. Ættin er tann besta í Norðragøtu. Tað er lítið vindur í ættini, hóast nógvur vindur er kring landið. Tað blikar á lánni.

Stendur tú í túninum heimi í bygdini, tað er har sum tann gamla kirkjan er, og brestur ein svávulpinn, og hann slóknar, so er ikki farandi til útróðrar yvirhøvur. Tí er hon eisini kallað konufólkaættin í Norðragøtu.

Tá ið fjallboð skulu gevast til fjallgongu í Ytrilíð, tað er á Gøtunesi, verður hugt suður undir Mýrarnar, sum eru nakað sunnan fyri Syðrugøtu. Hvíttar har, er ikki bátaveður.

Ættin er ikki vát, tó er hon ikki terraætt, tí tað er ov stilt. Tað kann surka yvir Ritafjalli.

Landnyrðingur er ikki brimætt í Norðragøtu, men tað kann runa og súga eitt sindur.

Tað er ikki mjørki í Norðragøtu á landnyrðingi.

## Landnyrðingur eystan

Veðrið í Norðragøtu, tá ið hann er landnyrðingur eystan, líkist veðrinum á eystri. Tað kann regna í Fuglafirði, men tað steðgar á Varmakeldueiði.

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, kemur lotið heim eftir víkini av Gøtunesi. Hann liggur tráur og javnur inn eftir víkini.

Tað er næstan altíð gott veður í Norðragøtu av eystri. Inni í dalinum kann vera still, tá ið tað er nakað av vindi heimi í gomlu bygdini. Allar eysturættirnar eru góðar í Norðragøtu. Í ringum veðri er eystan ikki so ring í Norðragøtu sum hon er í Syðrugøtu. Vanliga er minni vindur í Norðragøtu á eysturætt, enn tað er kring landið.

Dalurin er smalur, og fjøllini høg, og tí kann ættin á onkum staðið kennast øðrvísi. Við Tussagjógv kemur eysturættin fram við fjallinum og beint oman í vindeygað.

Ættin er ikki vát, men er regn í honum á eystri, regnar í Norðragøtu. Tá ið stórkavin legðist í 1947, var tað í eysturætt.

Til mjørka er eysturættin einki serlig í Norðragøtu. Hon er ein mjørkaætt. Er mjørki í Havn og á Lambavík, so kann eisin fyllast inn eftir Gøtuvík.

Eystan er ikki brimætt í Norðragøtu, hóast hon er ringasta brimættin í Syðrugøtu. Tað kann tó brima á lónni. Har ber ikki til at halda grind til, tá ið nakað av vindi er eystaneftir.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist veðrinum á landsynningi.

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, kemur hann javnur og góður heim eftir víkini, og vindferðin er tann sama sum fyri landið.

Ættin er vár, tað regnar ofta í Norðragøtu á landsynningi. Ofta rann runuvatn úr ánni, og kom hesin brúnin út á Barkhellu, stakk hann vesturum.

Landsynningur er mjørkaætt, hann fyllir dalin. Mjørkin vinnur ikki upp um Varmakeldueiði.

Landsynningur er eisini brimætt. Í nógvum vindi er nógv brim. Í lítlum vindi karraði hann inn eftir víkini og bleiv til mjørka.

## Landsynningur sunnan

Tá ið hann kemur av landsynningi suðuri kann tað vera ringt veður heimi í bygdini. Í aðrar mátar líkist tað útsynningi.

## Sunnan

Er ættin sunnan, er hann farin at líva av Mjóvanesi. Vindurin er javnur á ættini, sum er roknað sum ein góðveðursætt.

Tað er minni vindur í ættini, enn tað er kring landið, og ættin er yvirh'vur turr, men tað kann æla.

Tað er hvørki brim ella mjørki á suðurætt. Hann fer norður ígjøgnum fjørðin.

## Útsynningur sunnan

Veðrið á útsynningi suðuri líkist veðrinum á útsynningi. Hann kann vera ringur heimi í bygdini, men góður inni í dalinum.

## Útsynningur

Tá ið ættin er útsynningur, kemur hann oman av Múlanum. So leingi hann vinnur inn fyri Torvuna, er hann útsynningur.

Yvirhøvur er tað ein keðilig ætt inn í dalinum, men ein hampulig ætt heimanfyri. **HAVI EISINI SKRIVAÐ: HANN ER GÓÐUR INNI Í DALINUM.**



*Mynd 3: Ímóti útsynningi.*

Útsynningur er ójavnur við hvirlum, tá ið tað er nakað av vindi. Í ringum veðri fyllist bátahylurin, og stormurin fer niðan í gomlu bygdina.

Ættin er vanliga ikki vát, men tað kastar millum fjøllini og kann vera ælaveður.

Tað er hvørki mjørki ella brim, tá ið hann er útsynningur.

## Útsynningur vestan

Hetta er ringasta ættin og størsta skaðaættin inni í dalinum. Har eru harðar hvirlur í ringum veðri. Líka sum hann er heimi í bygdini, tá ið hann liggur av landnyrðingi norði.

Menn vóru júst lidnir at stilla upp til eini nýggj sethús, tá ið hvirla tók allar formarnar í einum líki, saman vid formunum til eitt seyðhús – teir flættaðu seg upp í SEV-linjurnar.

## Vestan

Tá ið hann kemur av vestri, kemur lotið oman av Tyrli. Vestan er ein góð ætt í bygdini, men ring inni í Leynum – tað er har sum fjósið er.



*Mynd 4: Ímóti vestri*

Tá ið ættin er vestan, er vindurin javnur heimi í bygdini, tó at tað hoyrist nógv fjalladun.

Vanliga er minni vindur í ættini, enn tað er kring landið.

Vesturættin er yvirhøvur nokkso turr í Norðragøtu.

Tað er hvørki mjørki ella brim, tá ið hann er vestan.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið í Norðagøtu, tá ið ættin er útnyrðingur vestan, er sum á vestri. Frá Eyðargøtu og inneftir er ættin ringasta skaðaættina.

## Útnyrðingur

Tá ið hann kemur av útnyrðingi, kemur lotið beint oman ígjøgnum dalin. Ættin er tann besta av høgættunum.



*Mynd 5: Ímóti útnyrðingi*

Útnyrðingur er tann besta av høgættunum í Norðragøtu. Vindurin er javnur, og vindferðin er ikki meira, enn hon er kring landið.

Ættin er ikki vát, og tað er hvørki mjørki ella brim, tá ið hann er útnyrðingur.

## Útnyrðingur norðan

Tá ið hann ælar av útnyrðingi norði, kemur hann oman ígjøgnum dalin og slær ímóti innan fyri Múlan.

Tað er meira vindurin í ættini enn aðrastaðni, og hann kann vera ógvuliga ójavnur, serliga innarlaga í bygdini og har inni í dalinum.

Ættin er sum so ikki eit vát ætt, men tað ælar. Hon er ikki sum landsynningur, men terraætt um summarið.

Eingin mjørki ella brim á útnyrðingi norði, men tað brimar innan Eið – t.e. á Varmakeldueiði.

Yvirhøvur er ættin er ikki so ring.